gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Nýggjar kanningar

## *Oddagrein*

HÓAST feriutíð og agurkutíð hjá pressuni, so koma kortini bæði tíðindi og áhugaverd úttalisi frá landsins hægsta stað í hesum døgum, landsstýrinum. Fíggjarmálaráðharrin og fiskimálaráðharrin boðaðu til fundar nú um dagarnar um fleiri týðandi og áhugaverdar spurningar, sum hava tilknýti til fiskivinnuna og búskapin komandi ár.

EISINI frá hægsta stað í Tinganesi eru komin úttalilsi, sum uttan iva mong halda vera áhugaverd. Eitt nú boðaði løgmaður frá nú um dagarnar, at landsstýrið umhugsar at fáa óheftar serfrøðingar á búskaparøkinum til at gjøgnumganga og kanna búskaparligu støðuna í landinum og tengja hetta saman við tí, sum er komið fram undir samráðingunum við danir um m.a. skiftistíð.

TAÐ kann einki verða skeivt í tí at lata uttanveltaðar búskaparfrøðingar og aðrar frøðingar gera kanningar av bæði hesum og hasum slag, um hetta má metast at gagna Føroyum og føroyingum. Ein kann siga, at tá hava vit so uppaftur fleiri kanningar at taka støðu út frá. Í løtuni fyriliggja jú fleiri slíkar kanningar frá bæði føroyskari síðu, íslendskari, danskari og heldur ikki mugu vit gloyma frágreiðingina, sum vinnumálaráðharrin bað um frá newzealendskum og amerikonksum búskaparfrøðingum.

LATIÐ okkum fáa alt á borðið, sum kann lýsa øll hesi mál meira gjølla. Tá er tað eisini av týdningi at arbeiðssetningarnir, sum antin IMF fólk ella onnur fáa, eru so breiðir og objektivir, at hetta er tilfar, sum ikki bert landsstýrið kann brúka men sum allir politiskir flokkar og annars føroyingar sum heild kunnu hava gagn av. Einki er so ringt sum at byggja dialogin um framtíðina sum uppá gitingar og hálvar kanningar og metingar.

TAÐ vil tí eisini verða rætt av landsstýrinum at fáa ein meting frá øðrum enn teimum, sum standa landsstýrinum nær, hvat ein møgulig IMF-kanning skuldi innihildið. Tað ringasta, sum kann henda er um vit frá byrjan leggja tingini skeivt upp. Tað má nú vera skyldan hjá landsstýrinum at fáa kanningar gjørdar, sum ikki hava nakað ávíst politiskt sikti. Sjálvandi skulu vit hava tilfar á borðið, sum kann greina og greiða tað mótspæl, sum vit hava fingið frá danskari síðu í samráðingunum. Hvussu rættar eru donsku metingarnar - ella hvussu skeivar eru tær. Og hvussu rættar ella skeivar eru okkara egnu metingar! So øll kort á borðið.

VIT eiga ikki at gloyma, at ein stórur meiluti av føroyingum vil størri sjálvstýri og eisini eina sjálvstøðugar Føroyar í framtíðini - innan fyri verandi ríkisfelagskap ella innan fyri eitt annað slag av ríkisfelagsskapi enn tann, sum í dag er galdandi. Spurningurin og ósemjan snýr seg m.a. um, í hvørjum tempo hetta skal vera í og hvussu karmarnir skulu síggja út.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Viðmerking til grein í Oyggjatíðindi

Á forsíðuni á Oyggjatíðindi mikudagin 05.07.2000 er grein um Heðin Arge Jensen og hansara »Black mailan« av føroyskum tónleikabólkum. Í hesi grein nýtur Oyggjatíðindi eina dulnevnda keldu úr føroyska tónleikaheiminum. Í samrøðu við blaðið nevnur Heðin Arge Jensen meg, Niels Una Dam, sum ein sum kanska kennur seg snýttan. Hetta fær tað at tykjast, sum um eg eri tann dulnevnda keldan.

Eg vil tí gera greitt, at eg ikki eri keldan til hesa grein. Um eg ætli mær at finnast at Heðin Arge Jensen í fjølmiðlunum verður tað ikki dulnevnt. Eg aldi lítið um fjølmiðlar, ið lata dulnevnd fólk hanga navngivin fólk út. Slíkar fjølmiðlar vildi eg helst sloppið undan at verða settur í samband við.

**Vinarliga**
**Niels Uni Dam**
**Dalslandsgade 8, J-802**
**2300 Keypmannahavn S**

# Stressað arbeiðsumhvørvið

*»Stressaðar« virkis- og stovnsskipanir gera einki gott*

Ein stovnur, ella ein fyritøka, við einari arbeiðsskipan, sum bjóðar starvsfólki sínum álvarsamt og framhaldandi stressað arbeiðsumhvørvi, er ein vánalig virkisskipan. Hetta heldur Torbjörn Åkerstedt, professari við Karolinska Instituttet. Hann helt fyrilestur á fundi hjá Norðurnevndini í Norðurlandaráðnum í Oslo týsdagin 27. juni um stress og at vera útbrendur. Hann heldur, at minkandi starvsfólkatal, økt effektivitetskrøv, størri ávirkan og óavmarkað ábyrgd saman við skiftandi arbeiðstíðum (eftir treytum arbeiðsgevarans) og samdøgurs-framleiðsla eru atvold til økingina seinnu árini av stress og stressavleiddum sjúkum.

Tøl úr Svøríki vísa eina øking í sjúkrafráveru orsakað av stress upp á 50% síðani 1997. Økingin av stressavleiddum sjúkum í sama tíðarskeiði var 100%. Talið av fólki, sum hava svøvntrupulleikar og møði at dragast við orsakað av stress, er økt við 50%. Åkerstedt, professari, roknar við, at tølini fyri hini norðurlondini helst eru nakað tey somu.

Hann vísti eisini á eina kanning, sum ein finsk kommuna hevði gjørt. Kommunan hevði roknað við at spara 10% við at seta starvsfólkatalið og annað tilfeingi niður við eini helvt. Men henda sparing varð skjótt etin upp av øktum kostnað av stress og stressavleiddu sjúkum og sjúkrafráverum.

Formaðurin í Norðurnevndin skeyt upp í samband við frágreiðingina hjá Åkerstedt professara, at Norðurnevndin átti at tikið hetta orðaskiftið uppaftur, tá núverandi virkisskipanin í nógvum norðurlendskum fyritøkum eftir øllum at døma førir við sær stóran kostnað fyri bæði einstaklingar og samfelag.

Á fundinum viðgjørdi Norðurnevndini eisini uppskot um stuðul til tann sjálvbodna sektorin í Norðurlondum, uppskot um felags norðurlendskt átak móti rúsevnismisnýtslu umframt móttiltøk ímóti teimum negativu árinunum á norðurlendsku vælferðarskipanina av globaliseringini.

Fyri Føroyar sita Jógvan við Keldu og Dan R. Petersen í Norðurnevndini hjá Norðurlandaráðnum.

# Sosialurin leggur um til litir



*Torkil Johannesen, tekniskur leiðari á Sosialinum, prentaði seinasta blaðið á Argjum, 23. juni* **Mynd: Jan Müller**

EIRIKUR LINDENSKOV

Sum lesarar okkara helst hava varnast, eru vit so smátt farnir at prenta blaðið í litum. Hetta er vorðið gjørligt, nú Sosialurin og Dimmalætting hava lagt prentsmiðjurnar saman í eina prentsmiðju, nevnd Prentmiðstøðin.

Við hesi samanlegging er nú bert ein blaðprentsmiðja í Føroyum, sum ríkiliga nøktar tørvin. Fara vit bert nøkur fá ár aftur í tíðina, høvdu flestu bløðini sína egnu prentsmiðju. Dimmalætting var tann fyrsta, ið legði um til rotatiónsprent, men Sosialurin og Dagblaðið fylgdu skjótt eftir.

Prentsmiðjan hjá Dagblaðnum fórst, tá blaðhúsið brann í grund fyri eini 10 árum síðani. Dagblaðið hevur síðani verið prentað fyrst á prentsmiðjuni hjá Sosialurin, men seinnu árini hjá Dimmalætting.

Krøvini til prentdygdina eru nógv økt seinnu árini, ikki minst krøvini um litprent. Av tí at báðar prentsmiðjurnar høvdu tørv á stórum íløgum til tess at nøkta hesum tørvi, varð gjørt av at leggja verandi prentútbúnaðin saman so at vit í felag kunnu gera íløgur í enn betri litprentmaskinur.

Sosialurin hevur ikki fyrr verið prentaður í litum, og skulu tí munandi umleggingar gerast í blaðframleiðsluni í blaðhúsum okkara á Argjum. Hesar umleggingar eru í gongd nú, og sum lesarin hevur lagt til merkis, hava øll bløðini ikki verið prentað í litum. Hetta er sjálvsagt av tí, at umleggingarnar ikki eru komnar upp á pláss enn. Tó verður altíð gjørligt at prenta lýsingar í litum.

Væntandi eru allar umleggingarnar komnar upp á pláss eftir summarfrítíðina, og kemur Sosialurin tá ú tí nýggjum líki.

gult cyan magenta svart



# Jesus brúkti ikki hjól

*39 ára gamli amerikumaðurin Keith Wheeler hevur ongan skund. Tá vit hitta hann oman fyri Hvítanes, hevur hann gingið heilt úr Sørvági dragandi ein stóran brúnan kross. Men tað er lítið av miklum. Farnu fimtan árini hevur Keith drigið krossin tveyogtjúgutúsund kilometrar ígjøgnum eini hundrað lond*

RÚNAR REISTRUP



**Mynd: Jens Kristian Vang**

Vit eru farnir út at leita eftir honum - manninum við krossinum, ið øll tosa um. Vit hava fingið at vita, at hann varð sæddur umborð á Gomlu Ternuni seinnapartin týsdagin, og at hann eftir øllum at døma er á veg til Havnar.

Stutt eftir at vit hava koyrt framvið gula skeltinum, ið sigur frá, at her endar Havnin, síggja vit ein mann koma gangandi niðan ígjøgnum Hvítanesbrekkuna - við einum stórum krossi liggjandi á herðunum.

Jú, myndin minnir ikki sørt um ta myndina, ið málað verður av Jesusi, tá hann sjálvur bar krossin út á Gálgata.

Men har er í hvussu er ein munur á Jesusi og Keith. Jesus brúkti ikki hjól.

Fyri at lætta eitt sindur um byrðuna, hevur brúni krossurin hjá Keith nevniliga eitt hjól í niðara enda, so ístaðin fyri at draga krossin eftir vegnum, rullar krossurin á hjólinum. Smart.

### Bukaður, skotin og yvirkoyrdur

- Við Guðs hjálp havi eg gingið í fimtan ár. Samanlagt havi eg gingið einar 22 túsund kilometrar og eg havi verið í fleiri enn hundrað londum við hesum krossinum, greiðir Keith Wheeler frá. Hann setir krossin frá sær og gevur sær góða tíð at práta.

– Eg eri blivin bukaður og steinaður. Eg havi sitið í fongsli fjúrtan ferðir, eg eri blivin yvirkoyrdur av bili tríggjar ferðir, fólk hava skotið eftir mær, sett knívar á barka mín, sett byrsumúlar fyri pannu mína, og einaferð eg gekk við krossinum úr Panama til Meksiko - ígjøgnum øll tey kríggsøki, ið tá vóru á tí leiðini - varð eg tikin í Meksiko og skuldi avrættast. Har stóðu fýra menn við byrsum og taldu upp í trý, áðrenn teir skuldu skjóta, men tá teir vóru komnir til tvey, duttu teir allir niður og fóru at gráta, greiðir Keith eldhugaður frá við einum smíli á varrunum. Spurdur hví hetta hendi, gerst amerikumaðurin við krossinum lítilátin og sigur, at byrsumenninir søgdu seg hava sæð eitt ljós kring hann. Helst var hetta eldflugur fáa vit at vita.

– Ella kanska var tað ein eingil ella Jesus sjálvur, leggur Keith so afturat.

### Trúarbólkar eru av tí ónda

Krossberin er tættur sum tunnan tá prátið fellur á trúarbólkar.

– Tú fært meg ikki at siga hvørjari samkomu eg hoyri til heima í Oklahoma, Fyri mær hevur tað ongan týdning hvønn bólk av kristindóminum fólk hoyra til og trúarbólkar eru í roynd og veru ímóti vilja Guðs, at tí hesir eru til fyri at taka dagar ímillum seg og aðrar bólkar, sigur Keith.

Hann hevur eisini valt at loysa seg frá teimum karmunum, sum ein kirkja ella eitt samkomuhús seta.

– Eg eri ikki prædikumaður – eg eri pílagrímur á ferð. Mær dámar einki at prædika á møtum ella í kirkjum, tí tá tosi eg, og hini lurta. Her á vegnum steðga fólk, fara úr bilinum, og so práta vit. Tað er stórur munur millum at prædika fyri eini samkomu og at tosa við fólk á alfaravegnum um Jesus. Mær dámar betur tað seinna, tí tá eru fólk meira áhugað – meira til staðar, sigur Keith og fortelur um tey mongu, sum hava steðga bili sínum og eru komin út at tosa við hann hesar fáu dagarnar, hann hevur gingið í Føroyum.

– Eg væntaði ikki at fólk fóru at taka ímóti mær á hendan hátt. Eitt par steðgaði bili sínum, og stigu út, meðan tárini runnu efir kinnum teirra. Tey klemmaðu meg, og vildu nærum ikki sleppa aftur. Tað var ein rørandi uppliving, sigur Keith

### Líkist Jesus - og tó

Hevur tú upplivað at fólk hava mistikið teg fyri at vera Jesus ella Messias?

– Nei. Jesus hevði einki hjól á sínum krossi, og hann doyði á sínum krossi. Vónandi doyggi eg ikki á hesum hjóldrigna krossi, men geri eg tað, so kann blóð mítt ikki taka syndir burt frá nøkrum. Tá Jesus doyði tók hann burtur syndirnar hjá okkum øðrum. So eg eri á allar mátar ólíkur Jesusi.

Keith Wheeler hevur tó einaferð upplivað, at fólk veruliga hava hildið hann verið Jesus. Tað var tá hann gekk í Rwanda, tá ræðuligt kríggj herjaði har.

– Eg havi sæð nógv ringt, men ongantíð so nógv og so ræðuligt sum í Rwanda. Eg fari altíð at minnast eina uppliving í hesum ræðuleikaherjaða landi. Eg gekk inn í eina bygd. Hár og skegg mítt var vælvaksið og eg var skitin eftir túrin ígjøgnum frumskógin. Tá eg kom til bygdina, reisti elsti maðurin í bygdini seg upp og byrjaði at klappa við hondunum, og sama gjørdu síðan øll bygdafólkini. Øll høvdu tey tár í eygunum. Teirra verð var komin at enda, og tey hildu at eg var Jesus. Eg mátti siga teimum, at eg tíverri ikki var frelsarin, men at eg var vinur hansara, og at hann ongantíð var langt burturi.

### Krossurin er ikki bara til pynt

– Eg gangi við hesum krossi fyri at gera sum Guð sigur. Eg eri sannførdur um, at Guð hevur kallað meg at gera hetta, og at hann brúkar hetta sum eina mynd, ið skal fáa boðskapin hjá krossinum út millum fólk. Nógv hava ein kross hangandi í hálsketu, men slíkt síggja onnur fólk fyrst og fremst sum ein prýðislut. Tað er beinanvegin nakað annað, um ein maður kemur dragandi við einum krossi eftir vegjaðaranum. Tá gerast fólk noydd at síggja krossin, sum tað hann er.

*Hvussu leingi ætlar tú at halda fram at ganga?*

– Hvør veit? Kanska verði eg yvirkoyrdur og lati lív av teirri grund, áðrenn eg fari úr hesum landinum – kanska verði eg skotin, hóast eg meti tað vera lítið sannlíkt at tað fer at henda her í Føroyum. Men tað stutta av tí langa er, at eg havi lært ongantíð at taka næsta andadrátt sum givnan, og tí hugsi eg heldur ikki um, hvussu leingi eg skal halda fram at ganga við hesum krossinum. Eg haldi bara fram til Guð sigur »steðga!«.

– Lívsmálið hjá mongum er at tey skulu liva væl so leingi sum gjørligt. Men eg haldi, at um tú fylgir Jesusi sum eg geri, má málið vera at fáa meira lív í tey árini ein hevur. Eg kann doyggja hvørja løtu. Men eg veit, at eg longu havi livað meira enn flestu onnur. Flestu fólk eru bara til - tey liva ikki.

### Kallaður til ókent stað

Keith Wheeler hevur konu og tvey børn. Tey eru mangan við á ferðum hansara, men á Føroyatúrinum er hann einsamallur saman við einum hjálpara, ið altíð er við honum.

Undan ferðini til Føroyar hevur hann verið í Noregi, Svøríki og Svalbard og gingið. Í gjár fór Keith heimaftur til Oklahoma í USA, har hann skal vera í tríggjar vikur, áðrenn leiðin gongur til Pólands, har hann skal vera við í eini felags gongu.

Men hví kom hann til Føroya?

– Guð kallar meg har, hann vil hava meg at fara. Fyri at siga tað sum tað er, so visti eg ikki at nakað æt »Faroe Islands«, tá Guð heitti á meg um at fara higar. Hann bað meg í sama viðfeingi fara til Svalbard, og tað kendi eg heldur einki til. So eg mátti fyrst finna hvar á landkortinum londini lógu, greiðir Keith Wheeler frá.

### Guð viti hví

Hann sigur seg einki vita um hví Guð sendi hann til Føroyar júst nú, so tann spurningin kunnu vit bert gita um.

Vit siga farvæl við amerikanska krossdragaran, sum er blivin eitt sindur kaldur av at standa stillur so leingi. Hann er bara klæddur í buksum, eini skjúrtu og einum vesti, so tað er kanska einki at siga til at føroyska veðurlagið hevur kølt hann eitt sindur niður hesa løtuna. Men Keith sleppur ikki langt. Í ein hálvan tíma hevur ein maður gingið og válað nakað burturfrá, og tá krossdragarin hevur gingið einar fjøruti metrar, fella teir báðir í tos.

Nei, maðurin við krossinum hevur ongan skund.

